# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Sam Vang úr Bragdinum vann bólk 1 hjá monnum*

# Runnu mótbrekkuna á Sornfelli

**41 rennarar fóru leygardagin undir teinin úr Kollfarðadali niðan á Sornfelli**

**RENNING**
*Tíðindaskriv*

Á fimta sinni varð Mif Top Run hildið leygardagin hin 25. august. Ikki færri enn 41 vælhýrdir rennarar møttu við Statoilstøðina í Kollfjarðadali at royna kreftirnar móti føroysku náttúruni. Teinurin fyri framman var 9,8 kilometrar, mótbrekka mest sum allan vegin.

Hóast veðrið ikki var til vildar, so varð ein glotti klokkan 15, júst tá renningin skuldi byrja. Hesin glotti helt sær til komið var á mál.

Sum sæst í luttakaratalinum er tiltakið eisini væl móttikið. Eftir renningina samlaðust øll í kaffistovuni inn í Sornfelli, har ein kaffi og hugnaprát var á skránni, meðan bíða varð eftir endaliga úrslitinum hjá hvørjum einstøkum.

## Mótbrekka

MIF TOP RUN verður fyriskipað av Mjørkadals Ítróttafelag. Hugskotið til hesa øðrvísi renning, sum byrjar í 75 metra hædd og endar í 680 metrar yvir havinum, er at geva renninginí eina serliga uppliving. Henda uppliving er sett saman av teirri avbjóðing, sum tað er at renna útvið 10 kilometrar í mótbrekku og so tað heilt serliga útsýni, ið er á teininum.

## Vinnararnir

Í bólki 1 hjá monnum vann Sam Vang úr Bragdinum við tíðini 46m 34s og í bólki 2 hjá monnum vann Regin Zachariasen, eisini úr Bragdinum, við tíðini 46m 55s. Metið hjá Sigurdi Justinussen frá 2005, 45m 02s, bleiv tó ikki sligið hesuferð.

Í bólki 1 hjá kvinnunum vann Bjørk Herup Olsen úr Bragdinum við tíðini 53m 43s, sum er 50s betur enn hennara egna met frá 2006. Í bólki 2 hjá kvinnum vann Ann Thomsen við tíðini 1t 01m 12s.

| Menn yvir 40 | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Regin | Zachariasen | Vestmann |
| 2 | Borgar | Biskopstø | Treysti |
| 3 | Andrass | Joensen | Bragdið |
| 4 | Jósvein Herup | Olsen | Bragdið |
| 5 | Per | Callesen | Tórshavn |
| 6 | Óla Jákup | Kristoffersen | Bragdið |
| 7 | Jógvan | Thomsen | Bragdið |
| 8 | Jákup-Alberg | Berg | Bragdið |
| 9 | Tummas | Anthoniussen | Treysti |
| 10 | Bárður | Ljósheim | Eiði |
| 11 | Kári | Simonsen | Bragdið |
| 12 | Hans | Egholm | Bragdið |
| 13 | Pauli Bo | Petersen | Sørvágur |
| 14 | Flemming | Petersen | Gøta |
| 15 | Hans Birgir | Hansen | Bragdið |
| 16 | Oddmar | Kruse | MIF |
| 17 | Heri | Ólason Dam | Tórshavn |
| 18 | Meinard | Eliasen | Hoyvík |
| 19 | Edvard | Hansson | Tórshavn |
| 20 | Fríðrikur | Bláhamar | Bragdið |
| 21 | Jan Egil | Kristiansen | Hoyvík |
| 22 | Regin | Jóannesarson | Bragdið |
| 23 | Óla Hans A. | Olsen | Tórshavn |

**Úrslit av Mif Top Run**

| Nr. | Fornavn | Eftirnavn | Felag/bygd/býur | Tí |
|---|---|---|---|---|
| **Kvinnur undir 40** | | | | |
| 1 | Bjørk | Herup Olsen | Bragdið | 00.53.4 |
| 2 | Rebekka | Fuglø | Treysti | 01.00.4 |
| **Kvinnur yvir 40** | | | | |
| 1 | Ann | Thomsen | Bragdið | 01.01.1 |
| 2 | Tordis Debes | Eiriksfoss | Bragdið | 01.01.4 |
| 3 | Marit | Paldan | Bornholm | 01.02.4 |
| 4 | Jóngerð | Høgnesen | Bragdið | 01.05.0 |
| 5 | Karin Kirke | Petersen | Treysti | 01.07.5 |
| 6 | Susan | Jacobsen | Treysti | 01.08.5 |
| 7 | Merry | Andresen | - | 01.11.0 |
| 8 | Ingrid B. | Patursson | Bragdið | 01.15.0 |
| 9 | Signe | Kjøller | Bornholm | 01.17.5 |
| 10 | Charlotte | Bjørnhof | Bornholm | 01.17.5 |
| **Menn undir 40** | | | | |
| 1 | Sam | Vang | Bragdið | 00.46.3 |
| 2 | Pauli | Johannesen | Hoyvík | 00.52.3 |
| 3 | Ámundur | Nolsø | Nólsoy | 00.52.5 |
| 4 | Andreas | Bøgsted-Møller | Bornholm | 00.55.1 |
| 5 | Allan | Dalsgarð | Tórshavn | 01.04.5 |
| 6 | Benjamin | Petersen | Gøta | 01.06.5 |

## Puerta andaðist í gjár

**Verjuleikarin hjá Sevilla og spanska landsliðnum, hin 22 ára gamli Antonio Puerta andaðist seinnapartin í ár**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í dystinum hjá Sevilla móti Getafe leygarkvøldið small Puerta brádliga um á vøllinum. Eftir at læknar komu til, megnaði spælarin tó sjálvur at ganga til skiftirúmið, har hann aftur small um.

Síðani hevur hann ligið í respiratori, men seinnapartin í gjár orkaði kroppurin ikki meira.

Samstundis vóru liðfelagarnir hjá honum í Sevilla í Grikkalandi, har teir skuldu spæla undankappingardyst í Champions League. Tann dysturin varð tó útsettur, tá deyðsboðini vóru kunngjørd.



*Antonio Puerta gekk sjálvur av vøllinum leygardagin, men í gjár andaðist hann eftir tríggja daga sjúkralegu*

---

## Krevja sjey milliónir

Parken Sport & Entertainment krevur nú sjey milliónir í endurgjaldi frá áskoðaranum, sum leyp inn á vøllin, tá Danmark spældi EM-undankappingardyst móti Svøríki fyrr í ár. Hendingin bar við sær, at Danmark ikki sleppur at spæla næstu tveir undankappingardystirnar á tjóðarvøllinum, og hetta gevur eisini peningaligan miss til Parken.

Somuleiðis hevur DBU boðað frá, at talan verður um endurgjaldskrav, men enn er ikki greitt, hvussu stórt hetta verður.

**-mørk**